ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

Administration of Occupational Safety and Health

Fútalág 1B P.O.Box 1134 FO-110 Tórshavn Faroe Islands

Tlf. +298 317811 Fax +298 314489 E-mail: info@arbeidseftirlit.fo

Skrásetingar nr.:

R-F016-1

Reglugerð
um
arbeiði við alibrúkum

1. Inngangur.



1.1 Henda reglugerð er gjørd við heimild í løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum, kunngerð nr. K-E015-1 um innrætting av tekniskum hjálpartólum, kunngerð nr.K-A005-1 um persónliga verndarútgerð og kunngerð um trygdarkrøv til persónliga verndarútgerð, allar lýstar galdandi frá 4. september 1995.

1.2 Sí eisini samarbeiðsavtalu millum Arbeiðseftirlitið og Skipaeftirlitið og reglurnar um alibrúk, ið eru lýstar í AMeddelse fra Søfartsstyrelsen nr. 8, 1995".

1.3 Reglugerðin umfatar alla útgerð og alt arbeiði við alibrúkum, á landi. Á sjónum verður øll flótandi útgerð umsitin av Skipaeftirlitinum, meðan alt arbeiði, ið verður gjørt á flótandi útgerð, bæði á einstøkum ringum og størri útbúnaði, verður umsitið av Arbeiðseftirlitinum.

Lógarheimild:

Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.
Kunngerð nr. K-E012-2 um evni og tilfar frá 4. september 1995.
Kunngerð nr. K-E015-1 um innrætting av tekniskum hjálpartólum frá 4. september 1995.
Kunngerð nr. K-A005-1 um persónliga verndarúrgerð frá 4. september 1995.
Kunngerð nr. K-A005-2 um trygdarkrøv til persónliga verndarúrgerð frá 4. september 1995

Útgivið fyrstu ferð:

26. november 1988

Seinastu broytingar:

21. februar 2000

2. Útbúnaður.

2.1 Útbúnaðurin skal verða tilgjørdur og kunna nýtast soleiðis, at hann er fult forsvarligur viðvíkjandi trygd og heilsu. Hann skal hava ta neyðuga styrki, stabilitet og flótievni til tað, hann er roknaður til.

2.2 Hetta er eisini galdandi fyri flótiútgerðina, sum verður nýtt undir gongu/koyribreytum og arbeiðs-pallum. Útbúnaðurin skal verða góðkendur av Skipaeftirlitinum.

2.3 Gongubreyt til útbúnaðin skal í minsta lagi verða 90 cm breið, og runt um hylin í minsta lagi 60 cm breið.

2.4 Tá t.d. netini verða hálaði upp, verða gongubreytirnar og pallarnir mest ávirkaðir á tí síðuni, sum vendir inn móti netinum.
Fyri at tryggja, at fólk ikki glíða útav, skal ein fótlisti (10 cm høgur) verða allan vegin um breytir og arbeiðspallar.
2.5 Rimaverk skal verða á gongubreytum, landgongdum, arbeiðspallum og flótibrúgvum, so

komast kann undan, at fólk detta a sjogv.
Tað skal verða bæði hand- og knælisti, við eini hædd uppá ávikavist 1,0 m og 0,5 m. Handlistin kann t.d. verða av jarnrøri - tog verða ikki góðkend til hetta endamál.

3. Serlig arbeiðsklæðir og verndarútgerð.

3.1 Ofta er tað neyðugt við serligum arbeiðsklæðum og trygdarútgerð. Tá arbeitt verður á aliringum, frá báti og annars allastaðni har vandi er fyri at detta á sjógv, skulu hesi fólk altíð í minsta lagi brúka bjargingarvest og allarhelst flótidrakt.
Arbeiðsgevarin ber útreiðslurnar av hesari útgerð og skal syrgja fyri, at hetta er til staðar og verður brúkt sum ætlað.Trygdarútgerðin skal verða góðkend av Arbeiðseftirlitinum.

4. Teknisk útgerð - trukkar, kranar v.m.

4.1 Flótandi útbúnaður, arbeiðspallar og koyribreytir til lands v.m., ávirkast ógvuliga nógv, tá teknisk útgerð, so sum kranar, trukkar v.m. verða nýttir her.

4.2 Fyri at nýta nevndu teknisku útgerð krevst ávikavist kranførara- og trukkføraraprógv, sum



aftaná lokið skeið verður latið av Arbeiðseftirlitinum.

4.3 Ávirkanin av tí teknisku útgerð økist í mun til vind og aldu og kann hetta ganga út yvir stabili-tetin. Áðrenn teknisk útgerð verður uppsett og tikin í nýtslu skal allur útbúnaður gjølla kannast av sakkønum fólki, fyri flótievni, styrki og stabilitet. Skipaeftirlitið ger nærri reglugerð um hetta. Aftaná slíka kanning skal váttan fyriliggja, áðrenn útbúnaðurin kann takast í nýtslu.

5. Bjargingarútgerð.

5.1 Um fólk detta á sjógv, er tað avmarkað, hvussu leingi tað kann klára seg í tí kalda vatninum. Støðan verður munandi verri, um viðkomandi er ávirkaður av kemikalium/medisini, ella er dottin í ein hyl, har medisin er latið í.

5.2 Tað er ógvuliga umráðandi, at fólk, ið arbeiða á slíkum støðum, altíð eru í flótidrakt, ella í minsta lagi í bjargingarvesti.
5.3 Á rimaverkinum skulu verða bátshakar og bjargingarkransar, við 30 m línu. Tað kann verða



upp til 50 m millum hvønn bjargingarkrans við bátshaka, tó minst ein á hvørjum hyli/ringi.

5.4 Tað kann verða torført at bjarga sær frá sjónum upp á eina gongubreyt vegna hæddina. Tað skal tí finnast fast ásettir leytarar, sum røkka 0,5 m niður í sjógvin. Fráleikin millum leytarnar má hægst verða 20 m, ella ein á hvørjum hyli/ringi. Bjargingarútgerðin skal verða góðkend av Skipa-eftirlitinum.

6. Arbeiðsljós.

6.1 Arbeiðsljósiðskal verða gott og hóskiligt. Tað skal í minsta lagi verða 25 lux við landgongdir og á ferðsluøkjum, og í minsta lagi 50 lux á arbeiðsstøðum og har bátar verða fermdir.

7. Vælfarsrúm v.m.

7.1 Vælfarsrúm, t.v.s. matarrúm, vaskirúm, umklæðingarrúm og toilettir, skulu verða innrættaði samsvarandi reglugerð um bygging og innrættan av virkjum í Føroyum.

7.2 Lívdarskúrar. Har langur vegur er frá arbeiðsstaðnum, ringunum ella størri útbúnaði, til fasta tilhaldsstaðið á landi, kann tað í ávísum føri verða neyðugt at seta upp lívdarskúr, sum arbeiðsfólkið kann kroka í, um okkurt skuldi verið áfatt.

7.3 Ventilatión. Ein partur av arbeiðnum gongur fyri seg innandura. Uttan eina munadygga ventilatión, vil arbeiðsfólkið blíva óneyðuga nógv ávirkað av dusti og dampum frá heilsuskaðiligum evnum t.d. tá medisin verður íblandað. Undir viðgerð av smolti, kann stór nøgd av t.d. formaldehyd verða í luftini.
Um ventilatiónin ikki er nóg munadygg, skal nýtast andadráttarverja, ið er góðkend av Arbeiðseftirlitinum, tá arbeitt verður við heilsuskaðiligum evnum - sí leiðbeining nr. L-A002-1, frá 4. februar 1988, um inniluft.

8. Einaarbeiði.

8.1 Einaarbeiði eigur ikki at koma fyri. Um hetta kortini er neyðugt, skal tað verða avtalað við ein arbeiðsleiðara, at regluligt samband skal verða við fólk á landi, t.d. við "walkie-talkie".

8.2 Fólkið, ið ger hetta arbeiði, skal verða ílatið flótidrakt, ið er góðkend av Arbeiðseftirlitinum. Eisini skal ein bátur verða væl bundin til staðið, har arbeitt verður. Allir bátar, ið verða nýttir til arbeiði í alibrúkum, skulu verða góðkendir til endamálið av Skipaeftirlitinum.

9. Kavaraarbeiði.

9.1 Kavaraarbeiði skal bert gerast av fólki við vinnubrævi sum kavari til tað ávísa dýpi, og skal fara fram, sambært Løgtingslóg nr. 51 um kavaravinnu frá 28 apríl 1992 og teimum kunngerðum, sum eru lýstar galdandi sambært hesa.

10. Vandamikil evnir (heilivágur, sóttreinsingarevni og onnur).

10.1 Tað má farast fram við størsta varsemi, tá arbeitt verður við hesum evnum í alibrúkum, tí fleiri teirra eru heilsuskaðilig. Fylgið tí gjølla teimum vegleiðingum, sum apotekið og útvegarin geva.

10.1.1 Antibiotika verður brúkt til at viðgera infektiónssjúkur hjá fiski. Apotekið letur tað vanliga sum pulvur, soleiðis at tað kann blandast í fóðrið. Vanlig antibiotika eru t.d. oxytetracyklin, trimetoprim/sulfadiazin og oxolinsýra.

10.1.2 Skaðilig árin á menniskju. Menniskju kunnu gerast ovurviðkvom fyri flestu antibiotika um mannalikamið kemur í samband við hesi.
Tað ber væl til, tá arbeitt verður við antibiotika-pulvuri, tí tað kann bæði verða andað niður í lunguni og koma á húðina. Vanlig tekin til ovurviðkvæmi eru trongd (astma) og húðútslag, men eisini notusøtt og hoyfepur kann koma fyri.
Onnur skaðilig avleiðing kann vera, at tann persónur, ið hevur verið fyri nógvum antibiotika av ávísum slag kann gerast infiseraður við mótstøðuførum bakterium, soleiðis at viðger við eitt nú tetracyklin ikki virkar.
Bakteriusamansetingin í sodningarlagnum kann eisini broytast um fólk støðugt fáa antibiotika í

seg.
Sum er, kunnu vit siga, at við tað at summi antibiotika verða nýtt til bæði djór og menniskjur, ræður um hjá menniskjunum ikki at gerast ovurviðkvæm fyri einum antibiotika. Hesum slepst undan við vanligum reinføri, við at nýta handskar, skort og hóskandi arbeiðsklæði.

10.1.3 Lúsatýningarevni. Vanligastu evnini hava verið Dichlorvos (Nuvan er handilsnavnið) og nú eisini Hydrogen Peroxid. Um heilsuligt árin á menniskju er at siga, at bæði Dichlorvos og Hydrogen Peroxid eru vandamikil evni, tá á hvønn sín hátt.
Dichlorvos kann treingja gjøgnum húðina, sjálvtum hon er óskadd. Dichlrovos er nervaeitur, sum í nóg stórum nøgdum kann drepa fólk eins og lús.
Akutt eitringareyðkenni kunnu vera slevan, ovurhonds sveitti, høvuðpína, svimbul, vaml, spýggja, magapína, smáar pupillur, vøddanøtran, kám sjón, órógv, fjáltur, krampar og at enda stegðaður andadráttur.
Um slík eitringareyðkenni koma fyri í samband við arbeiði við Dichlorvos eigur beinanvegin at verða farið til lækna ella lækni eigur at verða boðsendur, tiltess at mótheili vágur kann verða givin. Eitt serligt vandamál við Dichlorvos er, at ein lítil eitran kann ávirka eitt fólk soleiðis, at tað ikki ansar sær á vanligan hátt og tí dettur á sjógv og í ringasta føri druknar.
Tá arbeitt verður við evnum sum Dichlorvos, ið ávirka alt nervalagið eigur arbeiðsfólk at vera serliga væl vart, t. e. í handskum og í oljuklæðum.
Hydrogen Peroxid ella Brintyvirilt, H_2O_2, er evnaliga ógvuliga virki - tað oxiderar. Hydrogen Peroxid er húð- og slímhinnuørkymlandi og í høgum koncentratiónum eisini etjandi.
Sum altíð, tá talan er um eitrandi evni, er tað avgerandi hvør koncentratiónin er. Nógv tynnt er tað bert eitt sindur húðørkymlandi, serliga tá ið tað verður brúkt leingi, men tá ið koncentratiónin fer upp um 20% er tað sera ørkymlandi ella beinleiðis etjandi.
Tað er sjálvsagt eyguni, ið eru í serligum vanda, tá arbeitt verður við hesum evnum. Eisini andaleiðin, t.e. slímhinnurnar frá nøsini niður í lungapípurnar eru sera viðkvæmar fyri Hydrogen Peroxid guvu.
Hetta merkir, at um handfaringin av hesum evnum ikki er skilagóð ber til at fáa alskins trupulleikar á húð, slímhinnur og lungu. Her verður hugsað um eksem, reyð eygu, trega í nøs og hálsi og bronkitis. Um óblandað Hydrogen Peroxid kemur í eyguni kann ein gerast varðandi blindur.
Verður Hydrogen Peroxid slett á húðina eigur beinanvegin at verða skolað við vatni ella sjógvi. Um tað er konsentrerað Hydrogen Peroxid t.d. 40%, skal skolast leingi, einar 15 minuttir.
Um Hydrogen Peroxid verður slett á klæðir, eigur at verða farið úr teimum og tey eiga at verða vaskað. Um so illa ber á, at Hydrogen Peroxid løgur verður slettur í eyguni má skjótt berast at. Skolast skal við vatni ella sjógvi í minsta lagi 15 minuttir og síðani eigur at verða farið til lækna. Tey, ið ætla sær at fara undir arbeiði við Brintyvirilt í alivinnuni eiga at seta seg væl inn í trygdarkrøvini fyri at arbeiðið kann leggjast soleiðis tilrættis, at tað er vandaleyst.

10.1.4 Onnur evni. Her kunnu nevnast kloramin, jodoforar, formaldehyd, kaustisk soda og meyrusýra. Øll hesi evni eiga at verða umfarin við varsemi. Summi kunnu føra til ovurviðkvæmi bæði á húð og í lungum t.d. formaldehyd og onnur eru etjandi t.d. kaustisk soda. Aftur her er tað serliga at hugsa um egnaskaðar, tí minsti skvettur av slíkum lúti kann beina fyri sjónini.

11. Atgerðir, tá kemisk evni verða nýtt

11.1 Merking. Allur innpakningur skal merkjast við føroyskari ella danskari tekst, og skal greiða frá møguligum vanda og heilsuskaðiligum árini.
Eitt vandamikið evni má ikki nýtast, um eitt minni vandamikið evni kann nýtast í staðin fyri.

12. Upplæring og trygdarútgerð.

12.1 Arbeiðstakarnir skulu gjølla kunnast um teir vandar, sum eru í samband við teirra arbeiði.

Arbeiðsgevarnir hava skyldu at útvega neyðuga trygdarútgerð, og hava arbeiðstakarnir skyldu til at nýta hesa.

13. Datablød.

13.1 Arbeiðseftirlitið krevur, at tað á arbeiðsstaðnum er eitt fullfíggjað kartotek ella mappa við datablødum yvir øll evnir, sum verða nýtt. Hesi datablød skulu siga frá innihaldi, nýtslu, heilsuvandar, trygdartiltøk og fyrstuhjálp.
Útvegarin (leverandørurin) av evninum hevur skyldu til at tilvirka og útflýggja hesi datablød.

14. Goymsla.

14.1 Heilsuskaðilig evnir skulu goymast í skápi ella rúmi, sum skal verða væl og virðiliga læst.

7 GÓÐ RÁÐ FYRI AT KOMA UNDAN HEILSUSKAÐA

Samband við lækna. Ert tú við barn ella hevur varandi sjúku, set teg so í samband við lækna, áðrenn tú arbeiðir við vandamikil evnir.

Val av tilfari. Brúka tað minst vandamikla tilfari, tá hetta er møguligt. Brúka liðugtblandað tilfar heldur enn at blanda sjálv/-ur.

Goymsla. Hav ikki medisin á goymslu uttan til sjálva viðgerðina. Minnst til at goyma medisin og vandamikið tilfar í læstum skápi.

Góðan arbeiðshátt. Verð varin við handfaring av kemikalium. Ansað eftir tí, ið fer fyri skeyti. Nýt mátipumpu til t.d. formaldehyd, ístaðin fyri at skvatla við spannum o.ø. íløtum.

Persónligt reinføri. Ger tær ómak við persónligum reinføri. Tað er ógvuliga umráðandi at vaska sær væl, taka stoytibað og klæða um, aftaná at hava arbeitt við medisini og kemiskum evnum.

Persónlig verndarútgerð. Fylg altíð ráðunum um trygdartiltøk, sum standa á ílatinum, ella tilhoyrandi datablaði, t.d.eingangsklæðir, maskur, sílur og hanskar. Tað finnast nógv ymisk sløg.
Tað er umráðandi, at tú nýtir røttu trygdarútgerðina og at tú greiðir útvegaranum frá, hvørji kemikaliir tú skalt brúka. Tak møguliga viðkomandi datablað við.

Fyrstuhjálp. Kunna teg um tað sum stendur á databløðunum viðvíkjandi krøvunum til fyrstuhjálparútgerð, og syrg fyri at henda altíð er til steðar.

GALDANDI REGLUR, IÐ UMFATA ALIBRÚK.

1. Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.

2. Løgtingslóg nr. 26 sjúku hjá fiski, skeljadýrum og krabbadýrum frá 30. apríl 1987. *)

3. Løgtingslóg nr. 70 um aling av fiski v.m. frá 9. juni 1988. ***)**

4. Kunngerð um persónliga verndarútgerð frá 4. september 1995.

5. Kunngerð um trygdarkrøv til persónliga verndarútgerð frá 4. september 1995.

6. Kunngerð um evni og tilfar frá 13. februar 1997.

7. Kunngerð um innrætting av tekniskum hjálpartólum frá 4. september 1995.

8. Kunngerð nr. 126 um trygdararbeiði á virkjum v.m. við seinni broytingum frá 23. jan. 1979.

9. Kunngerð nr. 131 um sigling nærhendis alistøðum frá 1. nov. 1988. *)

10. Reglugerð um bygging og innrættan av virkjum í Føroyum frá 19. febr. 1979 við seinni broytingum.

11. Leiðbeining um inniluft.

12. Leiðbeining viðv. eiturevni, goymslur og handfaring, frá 7. mai 1986.

13. Løgtingslóg nr. 51 um kavaravinnu frá 28. apríl 1992.

14. Kunngerð nr. 138 um kavaraútgerð, um tryggleika og um læknakanning hjá kavarum frá 3. des. 1990.

15. Kunngerð nr. 29 um kavaraútgerð frá 15. jan. 1988.

16. Kunngerð nr. 30 um tryggleika hjá kavarum frá 15. jan. 1988.

17. Kunngerð nr. 501 um læknakanning av vinnukavarum frá 25. nov. 1985.

ARBEIÐSEFTIRLITIÐ, 8. februar 1996.

Eli Davidsen, stjóri (sign.)

NB. *) Hesar kunngerðir eru tað aðrir myndugleikar, ið umsita.